## PSG vil hava Thuram

36 ára gamli Lilian Thurham ætlar sær at skifta felag. Hann hevur sáttmála við FC Barcelona, men nú er franska felagði PSG úr Paris áhugað í roynda franska verjuspælaranum, sum er liðformaður á landsliðnum. Eisini feløg í Onglandi, Italia og Skotlandi sigast verða áhugað í Thuram, sum í hesum døgum stýrir fronsku verjuni undir EM-endaspælinum.



## Ongar umberingar frá Viggo

Um vikuskiftið fall avgerðin um, hvør flytir upp og kann flyta upp úr 2. Deild vestur. FC Fyn hevur stórar ætlanir, men tað var eitt skot fyri bógvin, at felagið ikki flytir upp í 1. Deild næsta kappingarár. Royndi venjarin Viggo Jensen var settur at tryggja uppflytingina, men hann megnaði ikki at halda liðið á uppflytingarplássunum. - Um tú setir tær stórar ætlanir um at flyta upp, so skalt tú ikki leita eftir umberingum, tá tað ikki eydnast, sigur Viggo Jensen við bold.dk

# Nihat sendi turkar í dreymaland

**Nihat Kahveci úr Villarreal var stóra hetjan í Turkalandi í gjár, tá hann við tveimum málum seinastu minuttirnar brádliga vendi hóttandi ósigri til víðari luttøku í fjórðingsfinalurnar í EM-endaspælinum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Fagnaðurin var ovurstórur, tá Nihat hevði sent seinasta bóltin í kekkiska netið*

*Mynd: Polfoto/AP*

- Tað er ófatuligt, at vit tapa ein dyst, hóast vit eru á odda 2-1, tá fýra minuttir resta av dystinum. Vit kunnu ikki loyva okkurt at gera tílíkt mistøk, sum vit gjørdu, og síðan vænta at vinna. Verjuparturin var ikki nøktandi í seinastu tveimum málunum hjá Turkalandi.

Jú, tað var sanniliga ófatuligt. Turkaland vann seg í gjárkvøldið víðari úr bólkaspælinum. Kravið var ein sigur móti Kekkia, men tað sá einki út, tá farið var um tíman av dystinum. Jan Koller og Jaroslav Plasil høvdu við hvør sínum máli lagt leiðina móti fjórðingsfinaluni. Men turkar fullu ikki í fátt.

Arda Turku minkaði um leiðsluna, áðrenn Nihat Kahveci seinastu løtuna sendi alt Turkaland í dreymaland. Tá tríggir minuttir restaðu av vanligu leiktíðini sendi hann bóltin um málstrikuna, tá Petr Cech í málinum stórliga mistók seg. Og tveir minuttir seinni sendi hann, umvegis samankomingina, í netið til 3-2. Ótrúligt og ófatuligt. Tað mátti kekkiski venjarin, Karel Bruckner, sanniliga eisini viðurkenna.

### Lítil og høgur

Lítið er at ivast í, at lágvaksni Nihat Kahveci er sera høgt í metum hjá turkan í hesum døgum. Hóast hann hevði gjørt stórvegis um seg, so tók hann av møguleikanum, tá hann beyðst. Liðskiparin tók ábyrgd, tá tað stóð á.

28 ára gamli framherjin er sáttmála bundin at spanska felagnum Villarreal, har hann hevur leikt seinastu tvey árini. Tað eru nú 10 ár síðani, at hann fekk sítt gjøgnumbrot í turkiska Besiktas, har hann skjeyt 27 mál í 114 dystum fyri felagið.

Fyrrverandi venjari hansara í turkiska stórfelagnum, John Toschack, fekk dugnaliga málskjúttan við sær til Spania og Real Sociedad í 2002. Saman við serbanum Darko Kovacevic royndist hann sera væl, har hann 58 ferðir var skrásettur sum málskjútti.

Í gjár kundi hann við sigursmálinum skjóta sítt mál nummar 17 í landsliðsbúnanum, tá hann sendi heimlandið í himmiríkið.

# – Dómaramistak kostaði sigurin

**- Tað ger ikki støðuna hugaligari, at Spania fær sigursmálið júst eftir, at ein av okkara verður háløður, segði Lars Lagerbäck, svenskur landsliðsvenjari, eftir ósigurin fyri spaniumonnum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

David Villa verður spældur einsamallur móti málverjanum. Olof Mellberg og Petter Hansson megnaðu ikki at verja fyri fríspælingini, og framherjin hevur nú møguleikan at tryggja Spania víðari luttøku. Hann sendir til vinstru hjá málverjanum Andreas Isaksson, meðan øll eygleiða bóltinum, sum hevur beina kós móti málinum. Klokkan vísir 92 minuttir, og Spania er á odda við tveimum málum móti einum.

- Tað ger ikki støðuna hugaligari, at Spania fær sigursmálið júst eftir, at ein av okkara verður háløður, var viðmerkingin hjá svenska landsliðsvenjaranum, Lars Lagerbäck, eftir ósigurin.

Luis Aragones og spanski landsliðshópurin hava verið flúgvandi í fyrstu dystunum, og úrtøkan ber við sær, at venjarin ætlar at geva fleiri av stuðulsleikarunum frí í seinastu bólkadystinum.

- Vit vóru við yvirlutan fyrstu stóru løtuna av dystinum og komu uppiborið á odda. Seinni mistu vit takið, og teir javna. Vit royndu at fáa sigursmálið í seinna umfarinum, og tað eydnaðist. Vanliga eru seks stig nóg mikið til at vinna seg víðari. Eg vænti, at vit gera broytingar í uppstillingini í dystinum móti Grikkalandi, segði spanski landsliðsvenjarin, Luis Aragones.

David Villa hevur verið ein av stóru leikarunum í hesum EM-endaspælinum. Fýra mál eftir tveimum dystum sigur ikki lítið um framherjan.

- Hetta málið smakkar væl betri enn tey trý, sum eg skjeyt móti Grikkalandi. Vit vóru betra liðið, men vit stríddu okkum til sigurs. Teir tóktist nøgdir við javnleikin. Míni mál eru ikki tey mest umráðandi, men sjálvandi eri eg fegin um tey. Vónandi halda vit áfram við hesum, helst líka til 29. juni, segði David Villa eftir dystin.

## Bentley vil royna CL

David Bentley var ein av profilunum á liðnum hjá Blackburn í farna kappingarári, men hann ynskir at skifta til eitt annað felag.

- Eg havi gjørt tað greitt fyri leiðsluni í felagnum. Eg vil gjarna bjóða mær sjálvum av við at spæla í Champions League, sigur Bentley.



Blackburn er ikki í nánd av Champions League, og tí má Bentley skifta til eitt av størru ensku feløgnum ella fara út um Ongland at spæla.

## Adebayor kostar ov nógv

Italska felagið AC Milan hevur víst stóran áhuga fyri álopsspælaranum Emanuel Adebayor, sum spælir fyri enska felagið Arsenal, men líkt er til, at Adebayor er ov dýrur fyri italska felagið. Sagt verður, at Arsenal vil hava 300 milliónir krónur fyri Adebayor, og tað er meira, enn AC Milan er ført fyri at gjalda. AC Milan skal eisini verða áhugað í Samuel Eto'o og Didier Drogba.